# Lærugreinaráðgevar

**Bókavørður**
Eitt starv sum bókavørður er leyst at seta frá 1. november 2007 ella skjótast til ber.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um vanligt bókavarðaarbeiði, eitt nú skráseting, røkt, avgreiðslu og ráðgeving.

Starvið fevnir eisini um aðrar *ikki-bókavarðauppgávur* sum bókhald og avgreiðslu um FSL-skipanina.

Landsmiðstøðin nýtir bókasavnsskipanina Aleph/eLib-booking, og hevur bókavørðurin saman við KT-vørðinum ábyrgd av samskiftinum við veitaran av skipanini.

Vit sóknast eftir fólki, sum hevur
- útbúgving sum bókavørður
- royndir við bókasavnsarbeiði
- royndir og/ella áhuga fyri bókhaldi og at nýta FSL-skipanina
- førleika og áhuga í at nýta teldu í arbeiðinum, og sum kennir til Aleph ella aðra líknandi bókasavnsskipan og hevur
- hollan kunnleika í føroyskum.

---

**Skrivstovufólk**
Eitt starv sum skrivstovufólk er leyst at seta frá 1. november 2007 ella skjótast til ber.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um móttøku og avgreiðslu av viðskiftafólki, útlán av undirvísingarmiðlum, røkt av bókasøvnum og ymiskt praktiskt arbeiði í sambandi við skeiðsvirksemi.

Landsmiðstøðin nýtir bókasavnsskipaninar Aleph og eLib-booking.

Vit sóknast eftir fólki, sum hevur
- skrivstovuútbúgving/skrivstovuroyndir
- viðkomandi arbeiðsroyndir, eitt nú frá bókasavni
- førleika og áhuga í at nýta teldu í arbeiðinum
- kunnleika til Aleph ella aðra líknandi bókasavnsskipan og hevur
- hollan kunnleika í føroyskum.

---

**Felags fyri bæði størvini**
Lýkur tú øll ella flestu førleikakrøvini omanfyri, dámar tær at arbeiða sjálvstøðugt, ert tú røkin, ert tú tænastuhugað/-ur, hevur tú góð samstarvsevni og hevur tú lætt við at samskifta við fólk, er tað helst tær, vit hava brúk fyri.

Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í einum stovni, sum hevur samskifti við flestu skúlar og lærarar í landinum, og sum hevur tætt samstarv við eitt nú Mentamálaráðið, Landsbókasavnið og Føroya Gjaldstovu.

Talan er um størv í fulla tíð. Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra í Landsmiðstøðini, tlf. 356850 ella 220414.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir v.m. skulu vera Landsmiðstøðini í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. oktober 2007.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v., o.ø. skulu sendast til:
**Landsmiðstøðin**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn
ella t-post: lms@lms.fo
Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 8. oktober 2007**.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra í Landsmiðstøðini, tlf. 356850 ella 220414.

**www.lms.fo** Landsmiðstøðin

**Landsmiðstøðin** er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, veitir fakliga og námsliga ráðgeving, skipar fyri eftirútbúgving av lærarum og hevur námsligan verkstað.

## SERNÁMSDEPILIN

### Ráðgevandi fysio – ella ergoterapeutar

Í Sernámsdeplinum er eitt fulltíðarstarv sum ráðgevandi fysio-/ergoterapeutur og eitt hálvtíðar avloysarastarv hetta skúlaár ( til 29 juni ) leys til setan skjótast til ber.

**Arbeiðsstað**
Høvuðsarbeiðsstað í Sernámsdeplinum í Tórshavn, men er arbeiðsøkið kanning og ráðgeving viðv. børnum og ungum ( 0-18 ár ) kring alt landið.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan er í greiningararbeiði at skipa fyri rørsluligum kanningum av børnum og at luttaka í eygleiðing av børnum, ið eru undir kanning. At veita ráðgeving til stovnar, foreldur og tey, ið annars eru um børnini, ið hava rørsluligar trupulleikar. Ein minni partur kann vera viðgerandi venjing. Arbeitt verður í samstarvi við H TM og Barnadeildina á LSH.

**Førleikakrav**
Útbúgvin fysio- ella ergoterapeutur. Fyrimun hevur umsøkjari við eftirútbúgving og/ ella royndum at kanna smábørn við serligum atliti til sansamenning. Tó eru fysio- ella ergoterapeutar, ið ikki heilt halda seg hava henda førleika, væl komin at søkja, tí í Sernámsdeplinum er førleikamenning av starvsfólki sjálvsagdur.

**Løn og arbeiðstíð**
Eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Arbeiðstíð, frítíð o.a. verður løgd til rættis í samráð við stjóran í Sernámsdeplinum.

Meira fæst at vita við at venda sær til Hans Eli Dahl, stjóra, ella Maluna Justinussen, ráðgevandi eygleiðara, Sernámsdepilin tlf. 314522.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møg. m. skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi tann **28. september 2007.**

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Tlf. 314522 – e- mail: sernamsdepilin@snd.fo


**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
Sosialurin 311820
**ADC**-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo



**Internet Sosialurin**
www.sosialurin.fo


mbf

## Livikorini hjá fyritíðarpensionistum í Føroyum

Í samband við, at kanningin av livikorum hjá fyritíðarpensionistum nú er liðug, skipar MBF fyri framløgu av kanningini á almennum fundi í **Miðlahúsinum, týsdagin 18. sept. kl. 19.00.**

Tað er Granskingardepilin fyri Økismenning, sum eftir áheitan frá MBF, hevur staðið fyri kanningini.

Við á fundinum verða Leila Solmunde, Olga Biskopstø og Hans Pauli Strøm

**Starvsnevndin**


